# handVERKARIN

1. ÁRSFJÓRÐINGUR 2004 BLAÐ NR. 10 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Aðalfundur 17. mars 2004 á Hotel Hafnia

## Skrá samb. § 25 í lógini:

1. Val av orðstýrara
2. Frágreiðing frá farna árinum
3. Roknskapur til góðkenningar
4. Innkomin mál/lógarbroyting (Lívstrygging/limagjald)
5. Val av nevnd
6. Val av tveimum grannskoðarum
7. Ymiskt



*Eli Brimsvík, formaður*

## Aftaná aðalfundin verður aðalfundur í Eftirlønargrunninum við hesi skrá:

A. Val av orðstýrara
B. Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna ári
C. Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
D. Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall.
E. Val av nevndarlimum
F. Val av grannskoðara
G. Møgulig mál frá nevnd/limum

## Í blaðnum hesa ferð: síða


| | |
|---|---|
| Sjúkragrunnurin BATI: Rættindi og skyldur | 3 |
| Jóhanna Hansen: Til Havnar at ganga í skúla | 4 |
| Limir fáa fíggjarligan suðul í samband við sjúku | 5 |
| Handverkarar hava altíð ferðast nógv, – fyrr fóru teir á valsin | 12 |
| Nevndarlimir og dagligur leiðari | 30 |
| Sjúkragrunnurin BATI: Umsóknarblað | 31 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Sjúrðargøta 20 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Snæbjørn í Dali · **Umbróting og prent:** Pf. Einars Prent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Evstamark til komandi blað er 20. apríl 2004 · **Blaðið er prentað: 15. mars 2004**
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Telefon 31 15 48 · fax: 31 95 48 · teldupostur: hhvf@post.olivant.fo.

# Rættindi og skyldur

**Tað hevur stóran týdning, at limirnir hava kunnleika til rættindi og skyldur. Í sambandi við sjúku er møguligt at fáa gjald úr sjúkragrunninum „BATA" sambært galdandi reglugerð:**

**§ 1.**
Navn grunsins er BATI. Havnar Handverkarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag eiga grunnin. Heimstaður grunsins er Tórshavn.

**§2.**
Limir Havnar Handverkarafelags og limir Havnar Handverksmeistarafelags hava, verða teir sjúkir, rætt til dagpening úr sjúkragrunninum sum ískoyti fyri mista inntøku.

**Stk. 2** Treytirnar fyri rætti til hesa hjálp eru:

a) At tann sjúki er virkin limur í Havnar Handverarafelag ella Havnar Handverksmeistarafelag.

b) At felagsgjaldið er goldið.

c) At hesin limur í Havnar Handverkarafelag arbeiðir, ella hevur arbeitt hjá handverksmeistara, sum rindar gjald í grunnin.

d) At limur Havnar Handverksmeistarafelags, ið sleppur at brúka grunnin, teknar egna trygging hjá BATA fyri ta upphædd, sum nevnd er í gr. 8, 2. stk.

**§ 3.**
Rætturin til dagpeningahjálp er treytaður av, at handverkari ella handverksmeistari seinastu 4 vikurnar, áðrenn

*… framhald á síðu 7*



*Nevnd Havnar Handverkarafelags: Frá vinstru Koos Kamminga, Jóhanna Hansen, dagligur leiðari felagsins, Kristian Eli Brimsvík, Danial Pauli Djurhuus, Sofus Joensen, Bjarni Pétursson.*

# Til Havnar at ganga í skúla

**Jóhanna Hansen er fødd og uppvaksin á Strondum. Pápin, Joen Carl Danielsen, av Fløtunum á Strondum, varð føddur í 1912. Jóhanna var bara 6 vikur gomul, tá hon misti pápan, sum doyði ungur í 1940. Mamman, Sanna á Høvdanum, er í dag 90 ára gomul, – fyllir 91 ár 5. apríl komandi.**



## Byrjaði á Preliminærskúla í 1954

Jóhanna flutti til Havnar, tá hon byrjaði á Preliminærskúlanum í 1954, og tók preliminærprógv í 1956. Og longu árið eftir, í 1957, byrjaði drúgva starvstíð hennara fyri fakfeløgini, Føroya Fiskimannafelag, Skipara- og Navigatørfelagið, Føroya Maskinmeistarafelag og síðani 2000 hevur hon verið dagligur leiðari hjá Havnar Handverkarafelag.

## Føroya Fiskimannafelag

Fimtiárini eru tiltikin vánalig, og eins og alt tað føroyska samfelagið var meint rakt av hesum tíðarskeiði, leikaði, sum vit vita, eisini mangan hart á hjá Føroya Fiskimannafelag.

Í 1957 varð Jóhanna sett í starv á skrivstovuni hjá Føroya Fiskimannafelag.

Hjá Fiskimannafelagnum var arbeiði hennara m.a. at røkja limalistan, og hon sigur okkum, at hesa tíðina arbeiddu nógvir føroyingar í Íslandi. Í hesum sambandi varð peningur fluttur úr Íslandi til Fiskimannafelagið. Og hennara uppgáva var tá at flyta limum, sum høvdu verið í Íslandi løn. Tá vóru ikki nógvir hentleikar, hon nevnir eitt dømi og sigur, at fjarrit kom úr Íslandi við nøvnunum, og peningurin varð so sendur við postávísingum. Og tá var størsta upphæddin, sum kundi flytast á einari postávísing 1.000,- kr. So tað vóru nógvar postávísingar at skriva, mangan eisini fleiri postávísingar til sama mann, -onkur fekk tríggjar, annar kanska 4 og fleiri postávísingar, allar skrivaðar og sendar sama dag. Nú verður alt flutt við teldu beinleiðis inn á kontoina hjá lønmóttakarum.

## Heima hjá børnunum

Tá Jóhanna var gift, fór hon heim at arbeiða, meðan børnini vóru smá. Hon var kortini styttri tíðarskeið nakrar tímar m.a hjá Zaharias Bech, og hjá Árna Jensen, sum hevði Teppihandilin í Tórsgøtu.

*… framhald á síðu 9*

# Limir fáa fíggjarligan stuðul í sambandi við sjúku

**Endamálið við sjúkragrunninum, BATI, er at veita limum fíggjarligan stuðul í sambandi við sjúku. Í sáttmála frá 1. mai 1971 millum Havnar Handverksmeistarafelag og Havnar Handverkarafelag samdust partarnir um at seta grunnin á stovn, og grunnurin hevur síðan 1. apríl 1973 goldið limum stuðul úr grunninum.**

Spurningurin um at veita handverkarum peningaligan stuðul undir sjúku er eitt av teimum málum, sum Havnar Handverkarfelag byrjaði at arbeiða við í 1969.

Spurningurin verður tikin upp til umrøðu við Meistarafelagið og partarnir semjast um, at í sáttmálanum pr. 1. mai 1971 verður ásett, at sjúkragrunnurin skal setast á stovn.

## Í 1972 kom gongd á

Tað varð tó einki gjørt við málið tá, men í 1972 tekur Havnar Handverkara-



*Antines Anthonissen, formaður*



*Bjarna Pétursson, næstformaður*

… framhald frá síðu 5

felag málið upp av nýggjum og samráðingar millum partarnar halda fram.

Úrslitið av hesum samráðingum er, at inntøkurnar hjá grunninum skulu koma av gjaldi, sum handverkarar og meistarar skulu gjalda, og verður gjaldið ásett til 10 oyru frá meistara av hvørjum tíma, sum handverkari hevur verið í arbeiði, meðan handverkarin sjálvur skal gjalda 5 oyru av hvørjari tímaløn.

## Meistarin skal afturhalda

Meistarin skal afturhalda handverkarans part í lønini og avrokna alt undir einum við sjúkragrunnin BATA ein ferð um ársfjórðingin.

Hesar reglur skuldu koma í gildi 1. januar 1973, men fyri tíðarskeiðið frá 1. mai til 21. desember 1972 skuldi hvør partur sær gjalda eina upphædd, sum svarar til ásetta gjaldið.

## Gjaldast frá 1. apríl 1973.

Dagpeningahjálpin skuldi gjaldast frá 1. apríl 1973.

Byrjað varð við at dagpeningahjálpin skuldi gjaldast frá 7. sjúkradegi, og var hálpin tá 75,- kr. um dagin til uppihaldara og 50,- kr. um dagin fyri ikki-uppihaldara. Handverkarin skuldi undir trúnaðartreytum vátta, at hann var sjúkur, og meistarin skuldi vátta, at viðkomandi hevði verið í arbeiði og goldið til grunnin.

Tað varð ikki kravt, at læknaváttan skuldi leggjast við, men grunnurin hevði rætt at krevja læknaváttan, um hann helt tað vera neyðugt, ella um sjúkan vardi í longri tíð.

Reglugerðin, sum varð samtykt áðrenn grunnurin fór at virka, er fleiri ferðir broytt – alt til fyrimunar hjá handverkaranum.

## Serligt umsóknarblað

Umsókn til BATA skal verða skrivað á serligt umsóknarblað, sum partarnir eru samdir um, og skal umsøkjarin undir trúnaðartreytum siga frá sjúku sínari og annars geva aðrar upplýsingar, sum eru týdningarmiklir fyri at gera av rættin til dagpening.

Umsóknarblaðið er prentað á síðu 31 í Handverkaranum.

## Broytingar í reglugerð

Í seinastuni hevur verið arbeitt við at broyta galdandi reglugerð soleiðis at §9 stk 4. verður:

Dagligu umsitingina av grunninum hevur Beinta Arge.

og stk. 5 til:

Beinta Arge umsitur inngoldið gjald í grunnin og dagpeningahjálp úr grunninum.

**Nevndarlimir í sjúkragrunninum BATI:**

Antines Anthonissen, formaður, valdur av Meistarafelagnum.
Bjarni Pétursson, næstformaður, valdur av Havnar Handverkarafelag.
Beinta Arge, nevndarlimur, vald av pørtunum í felag.
Beinta Arge er eisini skrivari grunsins.

… framhald frá síðu 3

hann er vorðin sjúkur, hevur havt í minsta lagi 40 tíma arbeiði ávíkavist hjá handverksmeistara, ella handverksmeistari í egnum virki.

a) Feriutíðin telur ikki við her.
b) Í verkfalli og verkbanni fellur rætturin til dagpening burtur.

**Stk. 2.** Eru á felagsins øki arbeiðsgreinir, har stuttir arbeiðssteðgir eru, kann nevndin víkja frá reglunum, nevndar eru í 1. stk.

**§ 4.**
Dagpeningahjálpin fyri fult óarbeiðsføri av sjúku er 90% av handverkaralønini, ið tá er, av hesum verður eisini goldin feriuløn.

**Stk. 2.** Sjúkragrunnurin BATI skal bert rinda munin millum ta upphædd, tann almenna dagpeningaskipanin rindar, og ta upphædd, BATI hevur fyriskipað.

**Stk. 3.** Dagpeningahjálpin verður ikki goldin í førum, nevnd niðanfyri:

a) Tá sjúkan er av tílíkum slag, at hon kemur undir tryggingarlógina.

b) Tá tann sjúki sjálvur við vilja ella av grovum gáloysni hevur voldað sær sjúkuna.

c) Tá óarbeiðsførið er komið av drykkjuskapi.

d) Dagpeningahjálp verður ikki goldin fyri frídagar fyriskipaðir við lóg.

e) Dagpeningahjálp verður ikki goldin í feriutíðini.

f) Verða almennu lógirnar broyttar og samsvara soleiðis ikki við tær uppsettu reglurnar í hesari reglugerð, verða tær broyttar soleiðis, at tær altíð samsvara almennari lóggávu.

**§ 5.**
Dagpeningahjálpin tekur við frá 3. sjúkradegi, í hvørjum sjúkraskeiði og kann verða goldin upp í 20 vikur, í 6 mánaðir á rað.

**Stk. 2.** Varar sjúkan í 2 vikur ella longur, verður goldið frá fyrsta degi.

**Stk. 3.** Dagpeningurin verður goldin fyri 5 dagar um vikuna.

**Stk. 4.** Fyrsta útgjaldingin fellur fyrsta fríggjadag eftir 3. sjúkradag og síðani einaferð um vikuna.

**§ 6.**
Verður umsókn um dagpening latin inn í seinasta lagi 10. sjúkradagin, verður tá dagpeningurin goldin frá 3. degnum. Um so er, at umsóknin kemur inn seinri, verður tá dagpeningurin goldin frá tí degi, umsóknin kemur inn, um ikki serligar umstøður eru, so at frávik kunnu verða gjørd frá hesum.

**Stk. 2.** Umsóknin skal verða skrivað á serligt umsóknarblað, sum partarnir eru samdir um, og skal umsøkjarin undir trúnaðartreytum siga frá sjúku sínari og annars geva aðrar upplýsingar, sum eru týdningarmiklar fyri at gera av rættin til dagpening.

**Stk. 3.** Umsóknarblað skal umframt verða undirskrivað av arbeiðsgevara við neyðugum upplýsingum.

… framhald á síðu 26





# Alt tær tørvar innan amboð og byggitilfar.

**• Kappingarførir prísir**
Timburhandilin leggur dent á altíð at bjóða viðskiftafólki sínum kappingarførar prísir.

**• Tænasta**
Vit leggja okkum eftir at bjóða viðskiftafólki okkara bestu tænastu, vegleiðing og trygd fyri røttum keypi.

**• Stórt úrval**
Vit leggja okkum altíð eftir at tú hevur eitt breitt úrval av byggitilfari í at velja.

**• Heildarloysnir**
Vit átaka okkum at geva tær tilboð uppá alt tilfar, ið skal nýtast til m.a. vanlig sethús og størri byggiarbeiði.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

**Tórshavn:** Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**Sandur:** Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • ht@ht-tilfar.fo • **Kambsdalur:** Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41 • ht@ht-tilfar.fo
**www.timburhandilin.fo**

… framhald frá síðu 4

## Skiparar og maskinmeistarar

Í 1980 fekk Jóhanna starv hjá Skipara- og Navigatørfelagnum og Maskinmeistarafelagnum, sum tá høvdu skrivstovu saman í bygninginum hjá Havnar Timburhandli á Eystaru Bryggju. Feløgini fluttu skrivstovuna í 1982 frá Timburhandlinum til bygningin hjá Svend Krosstein Yviri við Strond 3. Tey fyrstu árini var hon einsamøll á báðum skrivstovunum, men arbeiðið vaks nógv hesi árini, og frá 1990 arbeiddi hon burturav fyri Maskinmeistarafelagið.

Hjá hesum báðum feløgunum var eisini nógv arbeiði av at dagføra limalista og samskifta við limirnar. Harumframt skuldi limagjald krevjast inn, og tað kundi eisini mangan vera drúgført. Tað er eisini í hesum tíðarskeiði, at byrjað verður at arbeiða við teldum.

## Dagligur leiðari

1. mai í 2000 varð Jóhanna sett í starv hjá Havnar Handverkarafelag sum dagligur leiðari. Jóhanna leggur dent á, at hon kann ikki hava betur arbeiði, hóast tað altíð er ríkiligt at gera. Her er tað eisini limalistar, limagjald og eftirløn at halda skil á. Hon sigur, at hon hevur eitt arbeiði, sum bæði má sigast at vera áhugavert og spennandi.

## Sór broyting

Tá vit spyrja Jóhannu, hvat hon heldur vera mest broytt hesi árini, hon hevur arbeitt fyri fakfeløgini, er hon ikki í iva. Tað er avgjørt alt telduarbeiði, sum verður gjørt í dag. Vit kunnu siga, at teldan er høvuðsamboðið á øllum skrivstovum í dag. Tí er eisini bæði skjótari og lættari at halda skil á øllum tí, sum hevur við bókhald, limagjald og limalista at gera.

## Nógv áhugamál

Tá vit tosa við Jóhannu er skjótt skilligt, at hon er ein sera virkin kvinna, sum hevur fleiri áhugamál og frítíðarítriv. Serliga áhugavert er at hoyra Jóhannu siga frá teimum mongu ferðunum, hon hevur verið og ferðast serliga í Skotlandi og Hetlandi. Jóhanna hevur eisni stóran áhuga í enska málinum, og óneyðugt er helst at siga, at hon er rættuliga stinn í enskum, ikki bert til gerandistos, men øllum málsins mongu økjum.

Jóhanna hevur ferðast nógv. Og tá tað snýr seg um kunnleika og at ferðast, er Hetland hennara hjartabarn. Hon sigur okkum, at síðani 1984 hevur hon á hvørjum ári verið minst eina ferð í Hetlandi og vitja vinfólk, sum hon hevur mong har. Og síðani 1984 hevur hon, í fleiri førum, verið meira enn eina ferð sama ár, og vitja grannarnar fyri sunnan.

## Mangar góðar løtur og minni

Jóhanna hevur mong áhugamál – so mong, at møguligt er ikki her at greiða frá øllum. Men vit mugu kortini nevna hennara ítriv nummar eitt, sum hevur givið henni so sera mangar góðar løtur og minnir. Í hesum sambandi er ikki ov nógv sagt, at Jóhanna hevur tosað við fólk úr flest øllum heimsins londum, og tað sum hevur givið henni henda møguleika, er virksemi hennara sum „radioamatørur". Jóhanna hevur verið „radioamatør" í umleið 30 ár, og hevur øll hesi mongu ár sitið við sendaran og tosað við fólk, sum m.a. búgva í fjarskotnum londum.

you can
Canon
vit hugsa í litum...

Telefax
Printarar
Skannarar
Kopimaskinur
Digital myndatól

Canon



Canon
BUSINESS•CENTER

FARODANE

Brekkutún 4
FO-100 Tórshavn
Tlf. 311414
www.farodane.fo



vit eru eina-umboð fyri
KÄRCHER
trýst spularum
til ídnað



- vit
umvæla
eisini

TÓRSHAVNAR
MASKINHANDIL
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn · Tlf. 313442





RÚNI SØRENSEN
Snikkarameistari
✆ 31 27 00 • 21 27 00

- allar umvælingar
verða gjørdar,
bæði innan- og uttandura!



team85

**Palli á Dul**

góðkendur el-innleggjari

tel 310789

**Eykalutir**

- til flest allar bilar!

**ama**

Landsins størsta
goymsla av
eykalutum til bilar

Postboks 3061
Fo-110 Tórshavn,
tel 31 3816

Amboð
keypir tú
sjálvandi
frá Balslev!

ELEKTRA BECKUM

Paslode

metabo

Tel 31 11 22

www.balslev.fo

**STATOIL**

P/F STATOIL FØROYAR
Viðarnes, 100 Tórshavn
Tel 34 35 00, Fax 34 35 01

# Handverkarar hava altíð ferðast nógv, – fyrr fóru teir á valsin

**Handverkarafeløgini í Føroyum eru ikki gomul. Í 1930 varð fyrsta sjálvstøðuga handverkarafelagið, Klaksvíkar Handverkarafelag, stovnað. Og ikki fyrr enn 20 ár seinni, 12. februar 1950, varð Havnar Handverkarafelag stovnað. Eftir at Havnar Handverkarafelag var stovnað kom rættulig gongd á, og stig vóru tikin til at stovna sjálvstøðug handverkarafeløg í flestu størri bygdum í Føroyum.**
**Fyrsta landsfelagið fyri handverkarar, Føroya Handverkarafelag, var stovnað í 1957.**

## Handverkarar í 1673

Hóast handverkarafeløgini í Føroyum ikki eru gomul, so hava kortini altíð verið handverkarar í Føroyum. Okkum nýtist bert at hugsa um bátasmíð, fyri at gera okkum greitt, at dugnaligir hava teir eisini verið.

Lucas Debes greiðir í 1673 soleiðis frá um føroyskt handverk:

Dette folk er udi Haandarbejde ikke ubekvem. De sye selv deres Klæder, en Del vænne sig selv til Hus-Bygning og Snedkeri, en Del øve sig udi at bygge Baader, og bygge de skønne Baader, lette og meget bekvemme til at sejle med udi disse farlige Strømme, saa at de norske Baader ere ikke at ligne med de færøske. Andre af sig selv øve sig udi



*Soleiðis hevur ein Olavus Magnus (1490-1557) endurgivið ein gildisfund, sum hann sigur byrjaði við orðunum: „Í navni faðirsins, sonarins og heilaga andans. Amen. Brøður og systrar … (soleiðis vita vit eisini at konufólk vóru við á gildisfundi í miðøldini).*




*Í Týsklandi var ein handverksgrein, sum vit kundu nevnt "fiskameistari". Tann seinasti meistarin í „fiska-lauginum“ í Regensburg í Týsklandi doyði í 1630. Hann fekk grøv sína prýdda við hesum vakra merkið úr gulli og silvuri, – eitt tekin um seinastu ferð hansara. Óneyðugt er helst at siga at "fiskameistarin" ikki var sjómaður.*

Jern-Smideri saa at de gjøre alt Jernværk som kan udkræves.

Kvindfolkene foruden groft væve meget fint Vadmel, Sengeklæder med adskillige farver…

## Elstu felagsskapirnir nevndir „gildi“

Teir elstu felagsskapirnir í Evropa, sum minna um fakfeløg, og hava samband við handverkarar verða vanliga nevndir „gildi“.

Eitt „gildi“ var ein felagsskapur, ið skuldi fremja sínamillum hjálp og verju av limunum. Talan var eisini um viðurskifti, sum vit í dag seta í samband við tryggingar, t.d. hjálp í samband við eldsbruna, herverk og tjóvarí. Tað fevndi eisini um rættin at lána amboð/ognir frá hvørjum øðrum, rætt til fylgi á longum ferðum, og gjald av loysipengingi um limur varð tikin til krígsfanga. Og onkuntíð enntá eisini hjálp til blóðhevnd, tá limur varð myrdur.

Hesi gildi vóru kortini ikki altíð avmarkað til ein ávísan fakbólk - heldur til ein ávísan sosialan bólk í samfelagnum.

## Laug, – skipan og einkarættur

Seinni komu tey meira fakligu gildini, sum fingu heitið „laug“.

Eitt „laug“ hevði til uppgávu at skipa og taka einkarætt til handverkið, umframt at átaka sær tær skyldur, sum gildini frammanundan høvdu.

Tey elstu „laugini“ í Europa tóku seg upp í 1100 talinum, og bæði sveinar og meistarar skuldu verða limir í einum „laugi“. Samstundis gjørdust náttúrligu karrieru-stigini, lærlingur, sveinur og meistari vanlig.

## Meistarar, sveinar og lærlingar

Vit vita, at tey 3 stigini, lærlingur, sveinur og meistari, vóru galdandi í miðøldini.

Ein lærlingur skuldi vanliga svørja eið uppá ikki at giftast, ganga á drykkjustovu, slatra um meistaran ella húsfólk hansara, ella kosta meira enn ávísa upphædd um árið.

Tað mest vanliga var eisini at lærlingurin búði í lærutíðini heima hjá meistaranum, og lærutíðin kundi verða rættuliga long, í miðal 8 ár.

Tá lærutíðin var av og meistarastykkið góðkent, gjørdist lærlingurin sveinur og harvið limur í einum „laugi“. Tá gjørdist samstundis eisini

… framhald á síðu 16

**Alt vanligt el-tilfar**
**Skjót og trygg tænasta**

Heildarveitarar av:

- **ABB** El-motorum
- **DANFOSS** El-tilfari
- **OSRAM/Philips** vørum
- **NORSELIGHT/IBAK** Ljóskastarum
- **BEHA HEDO** Kabússum
- **ÚTGERÐ TIL STÓRKØKAR**
- **SKIPSKAÐALUM**
- **FREON**



team85

***Telefonin svarar alt samdøgrið!***

Stovnað 1935

PF **LEIF MOHR**
Smyrilsvegur 2 · 100 Tórshavn
Tel 311220 · Fax 314862
lm@lm.fo · www.lm.fo



Finskir ketlar
vælegnaðir til
okkara brúk
P/F Maria Poulsen
á Hálsi • Tel. 312 000
HESTPRENT · TEL. 314 555




Alt innan bátaútgerð
VOLVO
PENTA
GPS-plottarar
og sjálvstrarar frá
Cetrek
Bátatænastan
Gríms Kambansgøta 4 • Postsmoga 101 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 17 35 • Fax 31 38 35 • e-mail: batataen@post.olivant.fo
www.batataenastan.fo

… framhald frá síðu 13

møguligt at byrja sum sjálvstøðugur meistari.

## Avmarkingar verða framdar

Stórur fólkavøkstur í Evropa skapti kortini sum frá leið eina so mikið harða kapping at lærlingar og sveinar í størri mun gjørdust arbeiðsmegi hjá meistarum. Miðskeiðis í 1400 talinum blivu ov nógvir sveinar, og tá broyttust viðurskiftini munandi.

Reglur vóru settar í gildi, ið avmarkaðu loyvda talið av meistarum fyri hvørt fakið. Størri krøv vóru eisini sett til meistarastykkið, og kravt varð eisini at sveinurin í tí sambandi gjørdi stóra veitslu fyri "meistara-lauginum". Men hetta var so mikið krevjandi, at ikki mangir handverkarar megnaðu at skipa fyri slíkari veitslu.

Hóast krøvini ikki eru tey somu í dag, so er einki at ivast í, at tað vit í dag nevna sveinagildi hevur sín uppruna í hesum tíðarskeiði.

Hesar reglur hava sjálvandi verið hentar, tá tað galt um at halda skil á einum fjølbroyttum skara av handverkarum.

## At fara á valsin

Tað at umstøðurnar broyttust so nógv, og størri krøv vóru sett handverkarum





*Tað ráddi um at vera væl útgjørdur, tá farið varð á valsin. Her eru tveir handverkarar avmyndaðir, áðrenn teir løgdu leiðina „út í heim", – helst suðureftir.*

*Øll útgerðin skuldi við á myndina, og eru teir tí avmyndaðir bæði aftan og framman. Handverkarar úr Norðurlondum vóru eisini nevndir navarar, – stytting av skandinavar.*

gjørdi at handverkssveinar leitaðu burtur í onnur lond fyri at fáa arbeiði og samstundis eisini fáa sær størri kunnleika, og royna eydnuna.

Við tíðini bleiv hetta at ferðast millum lond ein fastur táttur hjá handverkarum, og varð nevnt „at fara á valsin.“ Í 1800 talinum var tað vorðið so mikið vanligt, at ein rættuliga stórur partur av lærlingunum í Evropa fóru „á valsin“, tá teir høvdu fingið sveinaprógv.

Tað var eisini mett at hava positivan týdning og kundi eisini vera ein fyrimunur, at ein handverkari hevði roynt seg „úti í stóru verð“.

Í hesum sambandi kundu vit nevnt, at enska orðið fyri handverkssvein, „journeyman“, er beinleiðis avleiðing av hesum viðurskiftum (at ferðast).

Millum handverkarar í Evropa var annars eitt sterkt brøðralag, og á mongum økjum hjálptu og stuðlaðu handverkarar hvørjum øðrum. Í hesum tíðarskeiði vóru handverkarar úr Norðurlondum nevndir „Navarar“ (skandinavar).

Laug hjá handverkarum í Danmark høvdu eisini sera stórt vald, og mistu ikki síni rættindi fyrr enn lógin um vinnufrælsið varð sett í gildi (1857).



*Hvørt laug hevði sítt merki, – vit kundu kanska sagt LOGO.*



*Hetta herbergið í Zurich í Sveis var nevnt „Navaraslottið". Har búu so at siga bara skandinavar.*

*Eitt langt tíðarskeið vóru alt ov fáir handverkarar í Sveis, og tí leitaðu eisini nógvir Norðurlendingar hagar, tá teir fóru á valsin.*

Hetta var árið eftir at okkara monopolhandil var avsagdur 1. januar 1856. Í býunum var eitt laug til hvørja handverksgrein. Limirnir høvdu einarætt til alt arbeiði, sum hoyrdi til handverksfakini, og limirnar ráddu eisini fyri um nýútbúnir sveinar og nýggir meistarar kundu fáa limaskap. Harumframt ásettu limirnir eisini, hvat gjaldast skuldi fyri handverksarbeiði.

*… framhald á síðu 20*

**BIRGIR KROSSTEIG**
*Múrarameistari*
*Jónas Broncksgøta 33A*
Tel 310696 • Fartel 210696 • Fax 321896




SUÐUROYAR SPARIKASSI

STUÐLAR

Postboks 2 · FO-900 Vágur
Tlf. 37 30 64 · Fax 37 33 40
E-mail: sparsu@post.olivant.fo

Postboks 374
FO-110 Tórshavn
Tlf. 32 19 98 · Fax 32 19 97

FO-950 Porkeri
Tlf. 37 39 00 · Fax 37 39 03

**PÓLAR**

*Akkumulatorar til øll endamál*

Pf. Einars Prent · 314929



TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA

Fransbreyð
...breyð frá Frans!

Fr. Restorff



Tín banki
- á privata
so væl sum
á vinnuliga
økinum

FØROYA BANKI

… framhald frá síðu 17

## Handverksvinna avmarkað tíðarskeið

Danski stórkeypmaðurin Niels Ryberg fekk í 1766 loyvi at hava umskipingargoymslu, og loyvi at reka handil og annað virksemi í Havn.

Í hesum sambandi hevði Ryberg virksemi í Føroyum tíðarskeiðið 1766 - 1788.

Rokna verður kortini ikki við at Niels Ryberg sjálvur hevur verið í Føroyum. Fyri seg hevði hann tveir danskar handilsmenn at vera fyristøðumenn, Christian Rosenmeyer og Urbanus Otto Floor.

Í mun til ta tá lítið á leið komna føroyska samfelagið, fekk hetta virksemi stóra ávirkan á mongum økjum. Her kundu vit t.d. eisini nevnt at fólkatalið seinna partin av 1700 talinum var niðanfyri 5.000, og at samfelagið annars var sera eintáttað. Landbúnaðurin og tað sum onkursvegna hekk upp í landbúnaðinum vóru – um hetta mundi – stórt sæð einastu vinnuvegir í landinum.

Hóast tíðarskeiðið við Rybergs Handli ikki var drúgt, so var virksemi kortini umfatandi.

## Nógv handverksvirksemi

Vit kundu nevnt, at handilshús vóru bygd í Vágsbotni. Eisini varð bryggja bygd út úr Bryggjubakka til goymsluhúsini, og brúgv var gjørd um ánna til Quillingsgarð, har bøkjaraverkstaður varð bygdur. At hava ábyrgdina og skipa fyri arbeiðinum í bøkjaraverkstaðnum kom Michael John Quilling, sum var frá oynni Man, til Føroya. Har starvaðust 16-18 bøkjarar, mest skotar, men eisini danir og føroyingar.

Rybergshandil hevði eisini tubbaksspinnarí; har arbeiddu tveir meistarar, og nakrir føroyskir lærlingar.

Vørurnar, sum komu uppá land til

*Hóast Rybergs Handil bara virkaði í Føroyum árini 1766-1788, so broytti hann kortini so mangt í Havnini. M.a. lærdu føroyingar hesi árini handverk, sum ikki vóru roynd áður í Føroyum.*





Rybergshandil í Havn komu mangan frá fjarskotnum leiðum við vesturindiafarum.

Talan var um vørur sum t.d. romm, sukur og tubbak úr Vesturindia. Og skipini, sum sigldu fyri henda handil vóru mong. Onkrar dagar lógu upp í 12-14 skip, sum sigldu fyri handilin, í Nólsoyarfirði.

## Fólk fluttu til Havnar

Tað fjølbroytta virksemið hjá Rybergs handli, hevði við sær, at føroyingar fluttu av bygd til Havnar, fingu lønandi arbeiði og høvið at læra handverk, sum ikki høvdu verið vanlig í oyggjunum fyrr.

Men tá frælsisbardaðin í Amerika endaði í 1783, og Bretland lækkaði innflutningstollin, hvarv grundarlagið undan virkseminum hjá Rybergs handli í Føroyum, og hann gavst í 1788.

Vit kundu skoytt uppí her, at presturin Jørgen Landt skrivar í bók síni „Færøerne", at í 1801 vóru: 2 smiðir, 2 timburmenn, 1 snikkari og 3-4 bøkjarar í Havn. Og tí mugu vit helst eisini siga, at virksemi hjá Ryberg í Føroyum ikki hevur havt stórvegis týdning fyri handverksvinnuna í Føroyum eftir 1788.

## Handverk og fakfeløg í Føroyum

Færøernes Skipperforening, seinni Føroya Skipara- og Navigatørfelag, varð stovnað í 1896, og er fyrsta felagið, sum ein føroyskur fakbólkur hevur stovnað, og samstundis elsta fakfelagið í landinum.

Føroya Reiðarafelag varð stovnað í 1908, og Føroya Fiskimannafelag í 1911.

Hesi trý feløgini hava tað til felags, at tey fevna um vinnugreinar á sjónum.

Vanliga verður sagt at fyrsta fak-

*… framhald á síðu 24*

Henning Sørensen
MÁLARAMEISTARI
TEL. 31 47 87 & 21 89 31

rør-tænastan
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

Eyðfinn Hansen
Box 1106
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
tlf./fax: +298 31 91 22
fartlf.: +298 21 91 22
e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo




www.reproz.com

Føroya Lívstrygging · P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 311111 · Fax +298 318919




# flogfelag Føroya fólks

Beinleiðis úr Føroyum til Keypmannahavnar, Billund, Reykjavíkar, Stavanger, Oslo, Aberdeen og London.

ATLANTIC AIRWAYS

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo

… framhald frá síðu 21

felagið, ið varð stovnað av fólki, sum arbeiddi á landi, var Enigheden á Tvøroyri. Enigheden varð stovnað í 1915, og skifti seinni navn til Arbeiðsmannafelagið Fylking. Hetta er kortini ikki rætt, tí Føroya Lærarafelag varð stovnað í 1898.

Hóast Fylking vanliga verður nevnt arbeiðsmannafelag, so var stórur partur av teimum, sum stovnaðu felagið handverkarar, sum arbeiddu á bedingini á Tvøroyri.

Tað er ongin loyna, at tað mangan var óheppið hjá handverkarum og arbeiðarum at vera í felag saman. Og tí skipaðu handverkarar í Føroyum seg eisini seinni í sjálvstøðug handverkarafeløg.

## Virki og menning

Fleiri av føroysku fakfeløgunum hava seinnu árini givið út bøkur, sum lýsa søguna hjá feløgunum. Vit kundu her nevnt, at Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag, hevur givið út bókina „Virki og menning". Felagið varð stovnað í 1933.

Í bókini „Virki og menning" er greitt frá søgu felagsins, og fyrsti formaðurin, Christian Thomsen, greiðir í bókini frá teimum fyrstu árunum hjá felagnum. Christian var handverkari, og sigur m.a. frá tí fyrsta sáttmálanum, sum felagið gjørdi. Hann greiðir eisini frá, hvussu lønin var áðrenn tær fyrstu samráðingarnar. Í hesum sambandi sigur hann: „Men lønin lá ógvuliga lágt, eg haldi 50 oyru hjá vanliga manninum, men vit handverkarar lógu heilt uppi á 80 oyrum".

Og um úrslitið av teimum fyrstu



*Christian Thomsen, fyrsti formaður í Fuglafjarða arbeiðsmannafelag.*

samráðingarnar sigur Christian Thomsen: „Sáttmáli bleiv undirskrivaður. Vit slakaðu við handverkinum niður í 75 oyru og fingu hini upp á 65 oyru". So her kunnu vit í dag ikki siga annað enn, at talan hevur verið um rættuligt samhaldsfesti.

## Rættulig handverkarafeløg í Føroyum

Handverkarafeløgini í Føroyum eru ikki gomul. Í 1930 varð fyrsta sjálvstøðuga handverkarafelagið, Klaksvíkar Handverkarafelag, stovnað. Og ikki fyrr enn 20 ár seinni, 12. februar 1950, varð Havnar Handverkarafelag stovnað. Eftir hetta kom rættulig gongd á, og stig vóru tikin til at stovna sjálvstøðug handverkarafeløg í flestu størri bygdum í Føroyum.

Fyrsta landsfelagið fyri handverkarar, Føroya Handverkarafelag, var stovnað í 1957.

# AGA Føroyar - Føroya Gassøla

- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarir:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing

*- vit hava sølustøð kring landið*

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo



Audi

SEAT

PORSCHE

**Bilasølan**
við Øssur Johannesen
Vegurin Langi - 188 Hoyvík - tlf. 31 53 54 - www.audi-vw.net

… framhald frá síðu 7

**Stk. 4.** Er umsøkjarin arbeiðsleysur, tá umsóknin verður latin inn, skal læknaváttan verða løgd við umsóknini.

**Stk. 5.** Er umsøkjarin ikki arbeiðsførur, tá tvær vikur eru lidnar frá tí, at sjúkan tók seg upp, kann grunnurin, tá tað verður hildið neyðugt, krevja læknaváttan.

**Stk. 6.** Grunnurin kann annars í øllum førum krevja læknaváttan, heldur hann tað vera neyðugt. BATI rindar kravda læknaváttan.

**§ 7.**
Fingin dagpeningur frá almennu dagpeningatryggingini ella vanlukkutryggingini skal verða drigin frá tí hjálp, ið BATI skal gjalda. Sama geldur, fær tann sjúki á annan hátt samsýning fyri mista inntøku.

**Stk. 2.** Um so er, at onkur á órættvísum grundarlagi hevur útvegað sær dagpening, missir hann rættin til hjálp fyri ta tíð, sum eftir er av gjaldskeiðinum, og órættvíst útgoldin hjálp skal verða endurgoldin. Í slíkum førum kann stýrið fyri grunnin taka avgerð um at sýta tí sjúka rætt til dagpeningahjálp í gjølla tilskilaða tíð, sum tó ikki má fara upp um 2 ár.

**§ 8.**
Dagpeningur verður goldin úr grunninum. Inntøka grunsins er tann peningur, sum handverkarar og handverksmeistarar gjalda í hann, og peningur, sum á annan hátt fellur til grunnin. Skyldur grunsins at veita dagpening røkka bert so leingi, grunnurin hevur tøkan pening.

**Stk. 2.** Gjald handverkarans í grunnin er 15 oyru av hvørjum tíma, sum løn er fingin fyri, og gjald handverksmeistarans er 30 oyru av hvørjum tíma, sum løn er goldin handverkara.

**Stk. 3.** Handverksmeistari, ið lýkur treytir fyri at fáa hjálp úr grunninum, skal gjalda 45 oyru av hvørjum tíma. Tað svarar til 1800 tíma arbeiðstíð um árið.

**Stk. 4.** Um grunsins fíggjarstøða loyvir tí, kann stýrið seta fram uppskot at hækka gjaldið í grunnin. Tað skal verða lagt fyri feløgini til góðkenningar.

**Stk. 5.** Handverksmeistarin hevur skyldu at taka gjald handverkaranna av lønini hvørja viku.

**Stk. 6.** Handverksmeistarin hevur skyldu innan 10 dagar í hvørjum fjórðingsári at lata grunninum yvirlit yvir navnið á og tímatalið hjá hvørjum einstøkum handverkara, sum hevur verið í hansara arbeiði í fjórðingsárinum frammanundan, og verður hetta yvirlit skrivað á serligt skjal, sum partarnir eru samdir um. Saman við yvirlitinum skal handverksmeistarin gjalda sítt og handverkaranna gjald í grunnin.

**Stk. 7.** Skyldar handverksmeistari grunninum pening, og skuldin er eldri enn enn 1 mánað gomul, og er ikki goldin í seinasta lagi 8 dagar eftir tað, at hann er kravdur eftir henni, kann henda skuld tá verða innheintað á vanligan rættarligan hátt.

**§ 9.**
At stýra grunninum verður vald ein trímannanevnd. Hon skal umsita grunnin og taka sær av ivamálum við-

víkjandi umsitingini og av tílíkum málum, sum annars koma undir grunnin.

**Stk. 2.** Nevndin í hvørjum felag velur sín lim. Triðja limin velja teir báðir, ið feløgini hava valt. Eru teir, ið feløgini hava valt, ikki samdir um triðja mann, verður heitt á dómaran at útnevna hann.

**Stk. 3.** Nevndin verður vald fyri 3 ár í senn. Nevndin letur statsgóðkendan grannskoðara grannskoða roknskapin. Nevndin setur grannskoðaran.

**Stk. 4.** Dagligu umsitingina við grunninum hevur Havnar Sjúkrakassi.

**Stk. 5.** Havnar Sjúkrakassi umsitur inngoldið gjald í grunnin og goldna dagpeningahjálp úr grunninum.

**Stk. 6.** Í ivamálum kann nevnd grunsins taka sær sakkøna hjálp, ið verður lønt av inntøku grunsins.

**Stk. 7.** Umsitingarútreiðslur grunsins og samsýningar til nevndarlimir, ið feløgini skulu góðkenna, verða goldnar av inntøkum grunsins.

**§ 10.**
BATI skal, tá talan er um skaða á arbeiðsplássi, gjalda handverkara munin millum tað, sum fæst frá almennu dagpeningatryggingini og fult viðurlag fyri vanliga vikuløn í upp í 14 dagar og síðan eftir galdandi reglum.

**§ 11.**
Roknskaparár grunsins er frá 1. januar til 31. desember.

**2. stk.** Grannskoðaður roknskapur skal verða lagdur fram á árliga aðalfundinum hjá báðum feløgunum.

**§ 12.**
Reglugerðin kann verða broytt, heldur stýrið tað verða neyðugt, men broytingar skulu verða lagdar fyri feløgini til góðkenningar.

**§13.**
Verður frá almennari ella aðrari síðu skipað fyri sjúkrahjálp, ið ger grunnin óneyðugan, verður hann tá tikin av.

**Stk. 2.** Grunnurin fellur burtur, tá ið fjórðingsárið endar, og skal tað verða lýst í almennum lýsingarblaði.

**Stk. 3.** Ognir grunsins verða gjørdar upp og mega tá ongantíð falla aftur til feløgini sjálvi, men verða latnar til ávíst gott endamál á tí øki, ið feløgini virka, og sum feløgini verða samd um.

**§14.**
Hesin sjúkragrunnur er settur á stovn sum lið í sáttmálasamráðingum millum handverkarar og handverksmeistarar 1. mai 1971.

Reglugerðing er broytt 1. januar 1984 og 8. februar 1999.

*Tórshavn, tann 8. februar 1999*

Fyri Havnar Handverksmeistarafelag

| | |
|---|---|
| Tummas H. Sørensen, | Antenis Anthoniussen, |
| Magnus H. Magnusen, | Vilhelm M. Johannesen, |
| Jákup Dahl-Olsen, | Arnfinnur Setberg, skr. |

Fyri Havnar Handverkarafelag

| | |
|---|---|
| Eyðfinn Petersen, | Árni Hádal, |
| Kaj Niclasen, | Harry Johannesen, |
| Jens Meitelberg, | Eyðfinn Petersen, skr. |

SANSIR TEL 355 355




# Øll kunnu keypa virðisbrøv

Mangir løkir smáir gera stórar áir, siga vit. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum. Ganga fleiri saman um at gera íløgur, kunnu tey fáa teir fyrimunir, sum størri íleggjarar fáa. Íløguprógv kunnu keypast fyri smærri upphæddir – heilt niður í 1.000 krónur. Kaupthing hevur fleiri íløgufeløg at velja ímillum – t.d. feløgini »Norrøn partabrøv« og »Lánsbrøv í donskum krónum«.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn • tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo

* Handverksútbúgvingar

* Støðisútbúgving

* Yrkisakademiútbúgvingar

* Skúlaheim

www.tst.fo - tst@tst.fo

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN



Marknagilsvegur 75
Postboks 239
110 Tórshavn

telefon 311957 - telefax 316621



pf VESTMANNA TIMBURHANDIL

Dygdar tilfar

FO-350 Vestmanna · Tlf. 472 000 · Fax 472 001 · www.vt.fo


Pf. Einars Prent · tel. 31 49 29

# Nevndarlimir og dagligur leiðari



## Kristian Eli Brimsvík — formaður

**Bústaður:** á Fløtti 14 A · Tórshavn · tlf. 31 64 32 og 21 15 40
Næstformaður í Landsfelag Handverkaranna og nevdarlimur í Eftirlønargrunninum
**Føddur:** 27-1-1958 · Útbúgvin skipssnikkari 1978
Arbeiðir á timburdeildini á Tórshavnar Skipasmiðju



## Danial Pauli Djurhuus — næstformaður

**Bústaður:** Vestmanna · tlf. 21 46 69
Formaður í Landsfelag Handverkaranna og nevndarlimur í Eftirlønargrunninum
**Føddur:** 14-6-1959 · Útbúgvin bygningssnikkari
Arbeiðir sum húsavørður hjá Dimmalætting



## Koos Kamminga — kassameistari

**Búðstaður:** Heygsvegur 29 · Tórshavn · tlf. 31 01 54 og 26 05 36
**Føddur:** 15-8-1946
Útbúgvin maskinistur 1963
Arbeiðir á Vatnverkinum hjá Tórshavnar kommunu



## Bjarni Pétursson — nevndarlimur

**Búðstaður:** Heygsbreyt 18 · tlf. 21 23 58
Formaður í Eftirlønargrunninum
**Føddur:** 3-3-1942
Útbúgvin bilmekanikari 1965



## Sofus Joensen — nevndarlimur

**Búðstaður:** Ovaragøta 70 · tlf. 31 68 49
**Føddur:** 31-7-1956
Útbúgvin elektrikari
Arbeiðir sum húsavørður á Lágargarði



## Jóhanna Hansen — dagligur leiðari

**Búðstaður:** Landavegur 13 · Tórshavn
Jóhanna Hansen er dagligur leiðari felagsins, og hevur umsiting og skrivstovu felagsins um hendi. Hon hevur í mong ár arbeitt fyri fakfeløg, og var á skrivstovuni hjá Føroya Fiskimannafelag frá 1956 til 1959, og hjá Maskinmeistarafelagnum í umleið 20 ár.

**SJÚKRAGRUNNURIN BATI** **UMSÓKN UM DAGPENING**

Umsóknarblaðið skal verða útfylt og undirskrivað og latið grunninum
í seinasta lagi 10. dagin eftir at sjúka er ákomin.
Kemur umsóknin seinni, verður dagpeningurin goldin frá tí degi umsóknin kemur inn.

Váttan frá limi nr. ________ í Havnar Handverkarafelag: ______________________________

Navn: ____________________________________ starv: ______________________________

Bústaður: ________________________________ Føðingardagur og ár: _________________

Dagpening frá Almannastovuni: ____________ Ja ( ) Nei ( )

Løn undir sjúku frá arbeiðsgevara: ________ Ja ( ) Nei ( )

Løn undir sjúku pr. dag Kr. ______________ Í hvussu langa tíð? ________________

Onnur hjálp: (t.d. vanlukkutr.) ___________ Ja ( ) Nei ( )

Onnur hjálp pr. dag kr. ______________ Hvussu leingi? ____________________

Fyrsti sjúkradagur ________________________ Hvør er sjúkan? ___________________

Er sjúkan orsakað av vanlukku? Ja ( ) Nei ( )

Er vanlukkan hend á arbeiðsplássinum? Ja ( ) Nei ( )

Persónsnummar: ___________________________

Peningastovnur: ___________________________ Konto nr. ________________________

Hvørjum arbeiðsgevara hevur tú arbeitt hjá seinastu 4 vikurnar áðrenn tú gjørdist sjúkur?
Navn arbeiðsgevarans: _________________________________ Tímatal: ________________

Hesir upplýsingar eru givnir undir trúnaðartreytum. Eg eri greiður yvir at dagpeningur, sum er tikin ímóti av órættum, skal endurgjaldast og at skeivir upplýsingar annars kunna føra til, at rætturin til dagpening verður mistur og at grunnurin hevur rætt til løgreglu-fráboðan, um tað gerst neyðugt.

*Tórshavn tann* ______________________

______________________________________

*Undirskrift*

Váttan frá arbeiðsgevara:
Hevur omanfyri nevndi tær seinastu fýra vikurnar beint áðrenn sjúkrafráboðanina verið
í arbeiði hjá tygum í minst fýra vikur: Ja ( ) Nei ( )
Um nei, so í hvussu nógvar tímar:

Seinasti arbeiðsdagur áðrenn sjúkrafráboðanina var tann: ______________________

*Tórshavn tann* ______________________

______________________________________

stempul og undirskrift




www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari